# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Móttøka fyri Lisbeth á Dimmalætting

Fríggjadagin 27. februar var móttøka á Dimmalætting í sambandi við at Lisbeth L. Petersen fylti 70 ár leygardagin 28. februar.

Lisbeth er ein av høvuðspartaeigarunum í Dimmalætting, og famlijan hevur verið við til at mynda blaðið gjøgnum mong ár og er tað framvegis.

Umframt vinir og kenningar vóru býráðs- og landspolitikarar, bæði úr Sambandsflokkinum og øðrum flokkum við til móttøkuna, har fleiri røður vóru hildnar.

Lisbeth hevur havt eina spennandi politiska karrieru bæði sum býráðs- og landspolitikari og sum fólkatingslimur. Hon sat í Tórshavnar býráð frá 1984 til 2000 og var borgarstjóri í Tórshavnar kommunu frá 1992 til 1996.

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Fríggjadagin var móttøka á Dimmalætting í sambandi við at Lisbeth L. Petersen fylti 70 ár, her er hon saman við ommudóttrini*



*Lisbeth og sonurin Georg, sum arbeiðir á Dimmalætting*



*Lisbeth og Árni Joensen, nevndarformaður í Dimmalætting*



*Jens Marius Poulsen, Katrin Holm, Lisbeth og systirsonurin Michael Jensen*



*Fyrrverandi blaðstjórin á Dimmalætting, Benny Samuelsen og Lisbeth*



*Nevndarformaðurin í Dimmalætting hevur handað Lisbeth ein málning*



*Árni Gregersen, blaðstjóri á Dimmalætting, ber fram eina heilsan til Lisbeth*



*Bergtóra Hanusardóttir við blómum*